# Seldu 5.000 plátur

**Tað var í 1983, at vestmenningarnir av Heygum funnu saman at spæla í tónleikabólki, og navnið Vestmenn kom av sær sjálvum. Síðani hevur bólkurin verið sjálvsagdur partur av føroyska samleikanum, tí hvør situr ikki eina viðhvørt og droymir undir stjørnunum fyri at finna ró?**



## Vestmenn



**Dagfinn Olsen**
dagfinn@sosialurin.fo

Vestmenn fara á pall á Summarfestivalinum í Klaksvík í summar. Og tað merkir við øðrum orðum, at ein hin fólkakærasti bólkurin í Føroyum aftur savnast, eftir at hava ligið stillur nøkur tíðarskeið hesi seinastu 20-25 árini.

Tað verður upprunamanningin, sum fer á pall: Ólavur Højgaard, Martin Joensen, Niels Olsen, Bogi Olsen og Jógvan í Toftum Olsen. Væntandi verða Rúna á Heygum og Jórun Højgaard eisini við. Tær sungu við, tá Vestmenn gav fyrstu útgávurnar út. Møguliga verða eisini aðrir tónleikarar, sum hava verið við Vestmonnum millum ár og dag, við á summarfestivalpallinum.

### Lot av vestri

Tað var í 1983, at bólkurin Vestmenn kom sum eitt frískt lot av vestri inn í føroyskan tónleik.

At siga, at hetta vóru nýbyrjarar, hevði verið at tikið munnin ov fullan, tí talan var um mannkomnar unglingar úr Vestmanna, ið høvdu funnið saman.

– Vit hava verið í gongd alla tíðina, hóast tað hevur verið upp og niður við, hvussu virknir vit hava verið. Og Martin hevur ikki verið við eini 10-15 ár, men hevur sum kunnugt roynt egnar leiðir, men tað hevur eisini verið fruktagott fyri allar partar, sigur Ólavur Højgaard, nú Vestmenn aftur savnast í upprunalíki.

Sjálvur hevur Ólavur eisini roynt seg sum solist við fløgu, sum er tikin upp í Nashville, men hann fór ikki undir hesa fløguætlan, uttan at hava vestmannin Martin Joensen sum stuðul, tá umráddi tekstirnar.

Nógv vatn er runnið, síðani fyrstu spírarnir, sum seinni gjørdust Vestmenn, spíraðu í Vestmanna.

– Eg spældi við Western sum heilt ungur, eg var kanska eini 14 ár. Teir mangladu ein sangara, so eg fór uppí. Har var Niels eisini við, minnist Ólavur, ið heldur, at tað var náttúrligt hjá Vestmonnum at finna saman, tí allir eru uppvaksnir sum brøður hús um hús í býlinginum á Heygum í Vestmanna.

– So fór eg niður til Danmarkar. Martin og Niels vóru eisini niðri. Heimkomnir funnu vit saman fyrst í 80'unum og fóru undir at innspæla plátu hjá Milson Zachariassen.

– Eg minnist, at Tinganest vóru har um somu tíð. Teir spurdu, hvat vit gjørdu, og vit hvat teir gjørdu. Eg minnist, at teir søgdu seg eisini spæla inn til útgávu, men at ætlanin var ikki so stór sum okkara. Men tað stuttliga í dag er, at báðar útgávurnar standa eftir sum varðar og fólkaogn, men á hvør sín hátt, sigur Ólavur.

- Vit fóru so til Hansenmann Tórgarð fyri at vita, um hann hevði áhuga í at geva plátuna út. Tá hann hevði hoyrt lagið "Eg siti so eina", tørvaði honum ikki at hoyra meira, men hann játtaði beinanveg. Hann gav nógv út og hevði varhuga av, hvat fólk vildi hava. Plátan kom út 19. september í 1983, og fyrstu vikuna vórðu 5000 eintøk seld. Eg haldi, at har var líka sum eitt hol, tí ongin hevði givið nakað út í eina tíð tá, metir Ólavur.

Ólavur hyggur í eina scrapbók við tilfarið frá døgunum, tá full ferð var á Vestmonnum og ummælarar vóru sum vera mann ymsir á máli.

– Summir nevndu hetta kvøðuljómatónleik, men tað sum stendur eftir er, haldi eg, at hetta er ein fólkslig pláta og okkurt nokkso djúpt er eisini at finna, t.d. sangurin Ró, metir Ólavur.

### Summarfestivalur og Vestmenn

– Nú vit práta um ummælarar, so er stuttligt at hyggja afturá, tí Steintór Rasmussen ummælti í juni í 1985 plátuna "Kanska í dag" og segði: "Vestmenn gjørdust fólkaogn hjá øllum føroyingum, tá teir fyri tveimum árum síðan smoygdu seg inn í hvørja stovu í landinum". Og nú biður hann okkum so koma á pall í Kalksvík so mong ár aftaná, greiðir Ólavur frá.

Sosialurin